# Vinnuvitan - móti betri vitan

**JÓGVAN VIÐ KELDU**
løgtingsmaður og fyrrverandi landsstýrismaður í útlendingamálum

**At tað var galið, vitsti eg og mong við mær, men so galið, vitsti eg ikki**

Óli á Deild Olsen, ábyrgdarblaðstjóri í Vinnuvitan vísir í oddagrein 11. oktober vinnuliga, vanvirðisliga ábyrgdarkenslu av lógarheimildum og lógloysi.

Antin er hann óvitandi, meiri óvitandi enn blaðstjóri á vinnuligum málgagni kann loyva sær, ella tekur hann undir við tí lógloysi, sum varð framt í útlendingapolitikki-num. At okkara vinstravenda Kringvarp Føroya ongantíð ynskti at seta seg inn í útlendingaproblematikkin, tykist samfelagið at kunna liva við, men vinnulívinum kann henda líkasæla gerast dýr.

Hann sigur m.a. soleiðis í hesi heldur ófrættakendu oddagreinini: "Áðrenn Fólkaflokkurin við Jógvani við Keldu slapp framat útlendingamálum, var eingin, sum tosaði um trupulleikar við arbeiðs- og uppihaldsloyvum til útlendingar. Hetta tyktist vera eitt avgreiðslumál..."

Eg skal í fyrstu syftu bert halda meg til hetta brotið í oddagreinini.

**Framd lógarbrot**
Skal fyribils heilt stutt greiða frá, hví einki hoyrdist áðrenn eg kom í landsstýrissessin og orsøkirnar til, at so mong mál endaðu sum álvarsom rættarmál og tað kann undra, at ikki fleiri mál endaðu í rættinum.

Fleiri av mínum fyrstu fundum í Innlendismálaráðnum vóru í samband við illa- og ólgógliga avgreidd útlendinga mál, sum høvdu gingið fyri seg í longri tíð. Ein nýsamrádd ítróttaravtala, sum ikki kundi viðgerast eftir, skeivar undirskriftir, og vinnufyritøkur sum ikki yvirhildu lógir og reglar, sum sendu fólk út í vanlagnur.

Í hesum sambandi var trýst lagt á meg bæði frá politiskari síðu og við alemnna kringvarpinum, sum bæði var innhabilur og ikki ynskti at vita, hvussu útlendingamál-og-politikkur hingu saman, eisini gjørdu ávísir aðrir fjølmiðlar seg skyldugar.

Ovasti rættarmyndugleikin – danski fútin – segði, at fingu vit ikki skil á hesum, "kasti eg málini frá mær". So ísurin var tunnur, umframt at í øðrum høpi var siglt tungan sjógv.

**Gav ongantíð eftir**
Í teirri tíð – tað vardi nevniliga eina tíð - tá løgmaður, Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin vóru samdir um at senda meg heim, tí teir ikki kláraðu trýstið, og eg sjálvandi ikki góðvilliga vildi fara, var eg glaður fyri, at eg ongantíð gav eftir fyri primitiva samfelda trýstinum og komið okkum longur út í lógloysi.

Heldur enn at geva embætisfólkunum í Innlendismálaráðnum frið og ta tíð, sum skuldi til, fyri at fáa skil á hesum hurlivasa og lógloysi, varð trýst lagt á meg bæði frá mínum egnu, andstøðuni, og ikki minst við okkara almenna kringvarpi sum vápni.

**Sjálvandi skulu vit hava útlendingar**
Lat meg í hesum umfari gera greitt, at sjálvandi skulu vit hava útlendingar til Føroya at arbeiða, bæði ófaklærd og ikki minst fólk við hægri útbúgving og dyggum royndum, men tað skal vera eftir okkara leisti og ikki eftir trýsti frá onkrum hissini!

Neyðugt var í øllum førum fyrst at fáa skil á tí óhugnaliga skila- og lógloysi ið hevði verið, áðrenn eg kom í landsstýrið. Hóskandi kundi Vinnuvitan spurt, hvussu upptøkan hevði verið ídag, um hetta slapp at halda fram.

Nei, oddagreinin hjá Óla á Deild Olsen, er greitt prógv um, tað sum føroyingar ofta gera seg skyldugar í, at leypa um tungu tøkini og stravna arbeiði og halda seg bara kunna droyma seg til eina loysn, sum í síðsta enda ikki er nøkur loysn.

Møguliga vendi eg aftur og viðgeri víðari ikki sørt simplu oddagreinina hjá Óla á Deild Olsen, ábyrgdarblaðstjóra í Vinnuvitan um, sum so grunt viðger eitt so álvarsamt mál, helst móti betri vitan.

# Tað er spennandi at lesa og stuttligt eisini

**BØKUR**

Bókadeildin hjá Føroya Lærarafelag er farin undir at geva bókarøðir út um hin herviliga dreingin Henry, sum als onki og ongan ræðist. Tvørturímóti so ger hann bara fortreð og er á ongan hátt sum beiggin Frálíki Fríðrikur, sum altíð aktar mammu og pápa sín.

Triðja og fjórða bókin eita: Herviligi Henry og lýsnar og Herviligi Henry lumpar tannálvuna.

Tá ið Hervilig Henry fær lús, gevur hann øllum hinum lús frá sær, og hann fer als ikki líka væl við tannálvum sum onnur børn.

Í hvørjari bók eru fýra søgur um skálkabrøgdini hjá Henry.

Herviligi Henry og lýsnar er 96 bls., og Herviligi Henry lumpar tannálvuna er 105 bls.




Francesca Simon hevur skrivað, Tony Ross hevur myndprýtt og Bergur Rasmussen týddi úr enskum. Bøkurnar eru heftar og kosta 95 kr hvør.

Í bókarøðini um detektivarnar Lassa og Maiu er fimta bókin nú at fáa til keyps. Tað er Mumiugátan, sum er um eitt loyndarmál á fornminnasavninum.

Ein ræðslusligin náttarvørður sær við egnum eygum, at ein 3000 ára gomul mumia er livnað uppaftur. Man hetta bera til? Lassi og Maia noyðast at loysa gátuna og skunda sær á fornminnasavnið at kanna málið.

Martin Widmark hevur skrivað Mumiugátuna, Sámal Kristian Jacobsen hevur týtt úr svenskum.

Bókin er 87 bls. og innbundin. Hon kostar 140 kr.

Frásøgukynstrið hjá Astrid Lindgren er kent um allan heim.

Í samband við at 100 ár eru liðin, síðan henda megnarkona kom í heimin, gevur Bókadeildin í hesum døgum út bókina: Søgur úr Dundurdali.

Í bókini eru fýra søgur um hendingar í Dundurdali. Søgurnar eru sera væl egnaðar at lesa upp fyri børnum. Ilon Wikland, sum vanliga prýðir bøkur eftir Astrid Lindgren, hevur myndprýtt hvørja síðu í bókini, so tað er ein fragd hjá barninum at fylgja við, meðan sagt verður frá søgunum.

Ella Smith Clementsen hevur týtt Søgur úr Dundurdali. Bókin er 78 bls., innbundin og kostar 150 kr.


Hólmin á Eiði er friðaður

**Høvundur vantaði...**
Tá vit í gjár prentaðu greinina »Hólin á Eiði er friðaður«, kom navnið á høvundanum ikki við. Tað er Janus Hansen, form. í Føroya Fuglafrøðifelag, sum hevur skrivað greinina. Vit biða orsaka mistakið

**blaðstj.**

# Arctic Prime Fisheries letur virki aftur

**Arctic Prime Fisheries, sum JFK eigur saman við øðrum, hevur gjørt av at lata eitt av sínum virkjum í Grønlandi aftur í morgin**

**FISKIVINNA**
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

- Grønland er eitt spennandi land at virka í, og vit vita, at tað kann vera eitt ævintýr, um tað gongur væl. Vakstrarmøguleikarnir eru eisini serstakliga góðir.

So bjartskygdur var stjórin í JFK, Hanus Hansen, í einari blaðsamrøðu í vár, tá Arctic Prime Fisheries hevði keypt trý fiskavirkir í Suður- og Eysturgrønlandi. Arctic Prime Fisheries er felag, sum JFK eigur saman við Kim Høegh Dam.

Men nú skriva grønlendskir fjølmiðlar, at Arctic Prime Fisheries hevur gjørt av at lata eitt av teimum trimum virkjunum aftur í morgin. Talan er um virkið í bygdini Kuummiut. Orsøkin er stutt, at virkið gevur ikki fíggjarligt avlop, sigur grønlendska útvarpið.

- Raksturin liggur ikki í okkara hondum longur. Nú eru tað politikararnir, sum mugu taka eina avgerð, sigur Kim Høegh-Dam við KNR. Hann sigur, at tað er nóg mikið av fiski í umráðnum, men at felagnum vantar fiskiloyvi til eitt línuskip, sum kann útvega virkinum fisk og samstundis virka sum útbúgvingarstað.

Borgarstjórin í Kuummiut, Anders Sanimuinnaq, harmast avgerðina hjá Arctic Prime Fisheries at lata virkið aftur.

- Nógv húski, sum hava virkið sum tilverugrundarlag, noyðast tíverri á kommunuskrivstovuna eftir almannahjálp, sigur hann við grønlendska útvarpið.


*Fiskavirkið í Kuummiut ber seg ikki og verður tí stongt* *Mynd: KNR*